Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Skipan við útlenskum serlæknum í sjúkrahúsverkinum

Spurningar:

1. Hvussu nógv serlæknastørv eru dekkað av læknum, sum búgva í Føroyum?
2. Er ætlanin at dekka fleiri serlæknastørv við læknum búsitandi í Føroyum?
3. Er møguleiki at tryggja eina serlæknaskipan, soleiðis at útskiftingin av úlendskum serlæknum er so lítil sum gjørligt?

Viðmerkingar:
Føroyar hava møguleika at nýta serlæknahjálp í grannalondum okkara, har vit ikki hava læknafakligheit í Føroyum. Nógvir føroyingar fáa sjúkraviðgerð eitt nú í Danmark. Eisini hevur føroyska sjúkrahúsverkið gleði av at fáa útlendskar læknar at dekka serlæknaøki, sum vit sjálv ikki megna at dekka í føroyska sjúkrahúsverkinum. Henda skipan hevur verið galdandi í longri tíð. Fleiri serlæknaøki eru tó dekkað av læknum, sum búgva í Føroyum.

Stóra avbjóðingin fyri sjúklingarnar, sum javnan hava tørv á serlæknahjálp t.d. psoriasis-sjúklingar og onnur við kroniskum sjúkum, er, at skiftandi serlæknar hava viðtalurnar á sjúkrahúsunum. Hesir viðgera ymiskt og tilmæla ymiskar viðgerðir. Á summum sjúkraøkjum eru læknar bert í Føroyum í stutt tíðarskeið, og so kemur annar lækni til næstu viðtalu. Hesir læknar, sum koma til Føroya í styttri tíðarbil, sita við avbjóðingini ikki at kenna sjúklingarnar og teirra sjúkragongd, hóast journalir eru tøkar. Fólk við kroniskum sjúkum hava sera stóra gleði av, at læknin kennir sjúkragongdina og sjúklingin væl, tí neyðugt er við javnari sjúkraviðgerð alt árið.

Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 27. mai 2021

Jóhannis Joensen